Heini O. Heinesen:

# Spekulantar hótta fiskidagaskipanina

*- Tað er spell, at fiskiveiðiskipanin nú verður hótt av spekulantum, sum einki hava havt við fiskivinnuna at gera. Tá ið trýstið økist, verður samlaða dagatalið skert, og tað gongur í fyrsta lagi útyvir teir, sum kanska bara hava eitt loyvi og ikki hava keypt sær eyka fiskidagar, heldur Heini O. Heinesen*





*- Vit hava brúkt einar 500 miljónir krónur til upphøgging og einar 25 miljónir krónur at fáa skittfiskabátarnar út av grunninum. Tí er tað ógvuliga harmiligt, at Fiskimálaráðið ikki hevur umsitið lógina betur, sigur Heini O. Heinesen*



*- Tveir "tøtlar" verða koyrdir út úr flotanum, og síðan verður ein trolari umbygdur og fær fiskiloyvi hjá hesum bátum, vísir Heini O. Heinesen á.*

*Myndin, sum Rúna Sivertsen hevur tikið, er tilvildarlig*



*Heini O. Heinesen heldur tað vera í tráð við lógina um vinnuligan fiskiskap, at trý loyvi verða løgd saman í tvey, soleiðis sum eitt nú P/F Beta í Saltangará gjørdi, tá ið felagið skifti tríggjar av gomlu kubatrolarunum út við tvey nýggj skip. – Men tað átti ongantíð at verið loyvt at lagt trý loyvi saman í eitt, heldur fyrrverandi vinnunevndarlimurin.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**- Sjálvt teir bátar, sum kundi verið tryggjaðir móti omanlopi, verða nú umbygdir til línuskip, sigur Heini O. Heinesen, sum í fleiri ár var limur og eisini formaður í vinnunevnd løgtingsins. Hann heldur, at hevði lógin um vinnuligan fiskiskap verið hildin, hevði ikki verið neyðugt við teimum skerjingum í fiskidagatalinum, sum verið hava, síðan skipanin sá dagsins ljós fyri átta árum síðan**

FISKIDAGAR
*Vilmund Jacobsen,*
*vilmund@sosialurin.fo*

Heini O. Heinesen, sum hevur verið limur í vinnunevnd løgtingsins í mong ár, heldur ikki, at uppskotna skerjingin í fiskidagatalinum, sum landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, hevur lagt fyri tingið, er nakað at tosa um í mun til økta veiðitrýstið, vit hava havt, síðan vit fingu fiskidagaskipanina.

Hann vísir á, at í lógini um vinnuligan fiskiskap stendur, at veiðitrýstið skal ikki veksa, men heldur minka, tá ið útskiftingar fara fram. Er trýstið vaksið, sum vit øll vita, tað er, er lógin brotin.

## Trýstið økt

Fyrrverandi vinnunevndarlimurin ásannar, at fyri at kalla hvørja útskifting, ið verið hevur, er veiðitrýstið økt, og í fleiri førum er talan um rættiliga stóra øking. Haraftrat hevur umsetiligheitin økt um trýstið á fiskastovnarnar.

- Upprunaliga var eg ímóti umsetiligheit, men seinni havi eg ásannað, at skal vinnan rekast undir búskaparligum treytum, sum neyðugt er, er eisini neyðugt við eini ávísari umsetiligheit.

Heini leggur tó alstóran dent á, at bæði umsetiligheitin og útskifting av skipum og bátum skulu vera innan karmarnar av lógini um vinnuligan fiskiskap.

- Men, sum tíðin er liðin, eru broytingar framdar í lógini, sum heldur ikki er fullfíggjað.

Hann torir ikki at leggja høvdið á blokkin fyri, at eingin sum helst skerjing av fiskidøgum hevði verið neyðug, um lógin varð fylgd.

- Søla av fiskidøgum fer fram, og fiskidagar verða seldir frá skipum, sum ikki hava verið í nakrari serligari vinnu, til skip, sum eru í vinnu at kalla alt samdøgnið.

## Verri grundarlag

Heini heldur, at Fiskimálaráðið hevur sæð ímillum fingrarnar við alt ov mongum viðurskiftum á økinum, og ikki minst finst hann at ráðnum fyri eitt nú at hava latið trolarar umbyggja til línuskip, sum fiska í bólki 4.

- Dømir eru um, at tveir útróðrarbátar verða tiknir út, og síðan verður ein umbygdur trolari settur inn í staðin. Á henda hátt økist veiðitrýstið - onkuntíð við heili 100 prosentum, samstundis sum grundarlagið verður tikið undan útróðrarflotanum og línuskipunum, tí ov fáir dagar verða í part.

Fyrrverandi vinnunevndarlimurin heldur, at soleiðis, sum lógin um vinnuligan fiskiskap hevur verið umsitin, eru garðar niðurbrotnir, og næstan einki mark hevur verið fyri, hvat hevur latið seg gera.

Heini sat 19 ár á tingi, og flestu av hesum árum var hann eisini limur í vinnunevndini. Nøkur ár sat hann eisini sum formaður. Hann hevur havt stóran áhuga fyri fiskivinnuni og økisfriðingarnar, sum vit fingu í januar 1994, vóru í fyrsta lagi hansara "barn". Í juni 1996 fingu vit so eisini fiskidagaskipanina.

- Eg haldi meg tí kenna fiskiveiðiskipanina og tankarnar aftanfyri hana rættiliga væl, og eg haldi meg eisini vita, hvussu henda skipan átti at verið umsitin.

## Mark uppeftir

Hann sigur, at avleiðingarnar av skerjingunum, sum standast av, at lógin ikki verður fylgd, í longdini fara at ganga útyvir teir, sum ikki hava keypt fiskidagar.

- Eg haldi, tað vera spell, at fiskiveiðiskipanin nú verður hótt av spekulantum, sum einki hava havt við fiskivinnuna at gera. Tá ið trýstið økist, verður samlaða dagatalið skert, og tað gongur í fyrsta lagi útyvir teir, sum kanska bara hava eitt loyvi og ikki hava keypt sær eyka fiskidagar.

Heini heldur, at skal veiðitrýstið minkast í mun til tað, sum trýstið er økt, síðan vit fingu fiskidagaskipanina, hevði verið neyðugt við eini skerjing upp á eini 25-30%.

- Hetta hevði so í fyrsta lagi tikið grundarlagið undan teimum, sum ikki hava tryggjað seg við at keypa eyka fiskidagar, sigur hann.

Fyrrverandi løgtingsmaðurin sigur, at upprunaliga ætlanin við fiskidagaskipanini var, at tú ongantíð skuldi kunna leggja meira enn tvey fiskiloyvir saman – hetta til tess at umgangast ov stórar broytingar í flotanum av hesum.

Hann heldur, at tað átti at verið eitt mark uppeftir, hvussu nógvar fiskidagar, eitt skip kann keypa.

- Eitt slíkt hámark vantar í lógini, men hesar ásetingar kundi landsstýrismaðurin gjørt við kunngerð.

## "Nummarplátur"

Heini heldur tað vera nógv fyri at síggja, hvussu fiskidagaskipanin hevur verið umsitin í Fiskimálaráðnum.

- Vit hava brúkt einar 500 miljónir krónur til upphøgging og einar 25 miljónir krónur at fáa skittfiskabátarnar út av grunninum. Tí er tað ógvuliga harmiligt, at Fiskimálaráðið ikki hevur umsitið lógina betur.

Hann fer so vítt sum at siga, at Fiskimálaráðið hevur latið menn, sum hava veiðiloyvi í bólki 5, selt gamlar "nummarplátur", síðan lógarbroytingar vórðu framdar á økinum. Hetta hevur eisini verið við til at máað støðið undan fiskidagaskipanini.

- Eg vísti í síni tíð á, at henda broyting í lógini var í stríð við grundlógina. Men tá var ikki so stórur áhugi fyri hesum bóki, og broytingin, sum vit fingu í 1995, kom inn í lógina saman við øðrum broytingum.

Heini heldur, at tað hevur verið við til at máað støðið undan fiskidagaskipanini, at útróðrarloyvi eru løgd saman til línuskip.

- Eg haldi, at Fiskimálaráðið í fyrsta lagi hevur ábyrgdina av, at veiðitrýstið er økt, tí ráðið hevur næstan kunnað skipað viðurskiftini, soleiðis sum tey sjálvi hava viljað. Í staðin fyri at halda lógina, er eitt økt veiðitrýst "potað" inn gjøgnum bakdyrnar, og politiskt er tað serliga Fólkaflokkurin, sum hevur hildið, at upprunaligu karmarnir í lógini vóru ov trongir.

## Línuflotin veksur

Hann sigur, at tá ið lógin um vinnuligan fiskiskap varð smíðað, vóru 19 línuskip inni í skipanini, men við verandi gongd fara hesi skjótt at tátta í tey 30.

- Sjálvt teir bátar, sum eins væl kundu verið tryggjaðir móti omanlopi, verða nú umbygdir til línuskip. Tveir "tøtlar" verða koyrdir út úr flotanum, og síðan verður ein trolari umbygdur og fær fiskiloyvi hjá hesum bátum.

Fyrrverandi vinnunevndarlimurin heldur, at mark eisini átti at verið fyri, hvussu leingi fiskidagar kunnu seljast.

- At fiskidagar verða seldir eitt ár í senn, er sínar sakir, men verða fiskidagar seldir forewer, sum Heini tekur til, heldur eisini umsetiligheitin uppat.

Heini O. Heinesen sigur, at hann í sínum starvi sum løgtingsmaður stríddist ímóti, at fiskidagaskipanin fekk ta lagnu, sum hon fekk.

- Men so hvørt, sum fiskiloyvir meira at kallað gjørdust til politiskt mutur uppundir val, gleið eg líkasum meira og meira burtur ímillum í hesum kjaki, sigur vinnunevndarlimurin gjøgnum mong ár.